## Deco til Chelsea

Nýggi venjarin hjá FC Barcelona, Josep Guardiola, kunngjørdi stutt eftir starvssetan sína, at hann ikki vildi hava Deco í hópinum. Síðan Luis Felipe Scolari bleiv kunngjørdur nýggjur venjari í Chelsea, hava søgurnar av álvara gingið um, at Deco, sum hevur leikt undir Scolari á portugisiska landsliðnum, skuldi koma við honum til felagið. Tíðindini eru í kvøld váttað á heimasíðuni hjá Chelsea. Deco hevur skrivað sáttmála við Chelsea, og roknað verður við, at prísurin hevur verið umleið 80 mió. kr.




## Víkingar í ferðsluóhappið

Víkingur róði ikki á eystanstevnuróðrinum fyri 6-mannafør við monnum, og hetta hevði sína orsøk. Tveir av manningini vóru nevnliga partur av ferðsluóhappi millum Fjarða, og tí vórðu teir fluttir á sjúkrahúsið ístaðin fyri at fara til róðrarøkið í Eysturoynni. Sum skilst var talan um eina yvirháling, ið ikki gekk heilt eftir vild, og tí varð bilurin við teimum báðum rógvarunum kroystur út av vegnum.

## Hvassi gjørdi bart

**Genturnar í Sunda Róðrarfelag hildu tørn, eftir at tær høvdu fingið ógvuliga góðan start**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tær skiftast um at vinna í róðrinum millum gentubátar. Drekin hjá Havnar Róðrarfelag vann á norðoyastevnu, Hvassi hjá Sunda Róðrarfelag vann í heimasjógvi á sundalagsstevnu, Drekin vann á jóansøku í Vági fyri einari viku síðani, og leygardagin var tað aftur Hvassi, sum var fyrstur á mál.

Hvassi leyp avstað og vann seg beinanvegin eina hálva bátslongd og kanska framum næstu kappingarneytarnar, og fremsta plássið var ongantíð rættuliga hótt.

Junkarin og kanska onkur bátur afturat fekk betri start enn Drekin, men tá ið málið var hálvrógvið, vóru tað tær á Drekanum, sum átti størstu megina millum teirra, sum ætlaðu at bjóða Hvassa av. Drekin tók seg eitt sindur inn á Hvassa, men tað var kortini eingin ivi um, at tað var Hvassi, sum fór fyrstur um málið.

Harvið hava Hvassi og Drekin vunnið hvør sínar tvær ferðir, og tí er kappingin um FM púra opin. Hvassi og Drekin hava sama stigatal.



*Nýggi báturin hjá Knørri hevur av álvara sett kós móti FM-heitinum. Alt bendir á, at ein sigur afturat er nóg mikið hjá stóra bláa bátinum*
*Mynd: www.drekin.fo*

# Ormurin fyri triðju ferð

**Ormurin styrkti sær um FM-støðuna, tá teir vunnu eystanstevnuróðurin, har tað bert er Havnarbáturin, sum kann skapa spenning um úrslitið**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var eingin slingur í valsinum hjá 10-mannafarinum hjá Knørrafelagnum.

Ormurin og Havnarbáturin kappaðust á fyrru túsund metrunum um fremsta plássið.

Áðrenn teir fóru um túsund metra málið, hevði Ormurin lagt seg á odda, og síðani var tað bara spurningurin, hvussu tryggur sigurin skuldi verða.

Ormurin fór støðugt frá Havnarbátinum, og í endaspurtinum høvdu teir umborð á Orminum hug at gera uppvísning, hóast munurin ikki var meiri enn ein bátslongd.

Nólsoyingurin kom á mál, men hann var ikki við í kappingini um tvey tey fremstu plássini.

Heiðabáturin bjargaði við sigri í kappingini millum 8-mannafør æruni hjá sigursvanda kappróðrarfelagnum NSÍ.

Hóast Eysturoyingur ikki luttók, so var ikki frítt, at rógvarar úr kappróðrarfelagnum NSÍ vóru við í kappingini millum 10-mannaførini.

Umborð á Havnarbátinum hava teir verið so mikið óhepnir, at tveimum monnum bórust frá at rógva við í dag. Tí vóru tveir av veteranunum í Kappróðrarfelagnum NSÍ umborð á Havnarbátinum. Teir eru Bogi Olsen og Martin Venned.

Men hetta tekur einki frá fína avrikinum hjá teimum umborð á Orminum. Hetta var triði sigurin í fýra róðrum, og harvið hevur 10-mannafarið hjá Knørrafelagnum sett beina kós ímóti FM heitinum.

# Eingin tekur Sílið

**Fjórða róðurin upp í slag vunnu dreingirnir á Sílinum, sum stevna móti púrasta vissum FM-heiti**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sílið vinnur hvørja ferð. Hetta er útsøgn, sum er tvífalt sonn. Eingin stóð dreingjamanningini hjá Sílinum kurl á Skálafjørðinum. Harvið var talan um sama vinnara, sum tað hevur verið tríggjar tær fyrstu ferðirnar – í Klaksvík, í Hósvík og í Vági.

Útsøgnin er eisini sonn á tann hátt, at hetta var áttanda ferðin, at Sílið bjóðaði seg fram í FM kappróðri higartil í ár, og hetta var áttanda ferðin, at Sílið var fyrst á mál. Umframt við dreingjamanning hevur Sílið vunnið fýra ferðir við kvinnumanning.

Sigurin var ógvuliga sannførandi. Sílið stakk seg beinanvegin framum hinar bátarnar, og Sílið var fremst allan kilometurin, sum tað verður róð. Á málinum var munurin aftur til Havfrúnna úr Vestmanna meiri enn tvær bátslongdir.

Havfrúgvin var skutin fremri enn Junkarin úr Kvívík, og so var eitt sindur aftur til Tjaldrið og hinar bátarnar.